# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# TEY KVALA FERÐAVINNUNA

Ferðavinnufelagið rópar nú varskó. Ferðavinnan, sum skuldi verða enn eitt bein undir einstáttaða føroyska búskapinum, hevur als onga virðing millum politikarar. So lítil er virðingin, at alt verður gjørt fyri at sleppa av við allar restirnar av Ferðaráðnum, sum fyri nøkrum árum síðani var ein stórur stovnur, sum tók sær av ferðavinnumálum burturav. Hetta ráð lá undir Vinnumálaráðnum, men tá vit rættiliga skuldu spæla fólk í húsi við uttanríkisráð og tí heila, so skuldi ferðavinnan undir uttanríkisráðið.

Cowboypolitikkurin hjá sitandi samgongu í Uttanríkisráðnum hevur sum øllum kunnugt ført til, at ferðavinnan bara er ein viðfáningur av sær sjálvari – og er forfjónað til eitt kustaskap í Fiskimálaráðnum, skil tað, hvør skilja vil.

At Fólkaflokkurin skíggjar alt, sum er alment, tað vita vit. Og rætt er tað, at slíkir stovnar hava tann eginleika at vaksa upp um seg sjálvan í egnum kongaríki. Men tað er júst tað, vit hava politikarar til. Teir skulu skera ígjøgnum, stinga út í kortið og leggja kósina. Fyri tað um fólkafloksmonnunum ikki dámdi Ferðaráðið og fólkið, ið har var, so var kortini ikki neyðugt at tæga stovnum sundur, so vit einki hava.

Eyðsæð er, at ferðavinnan er ein vinna, sum vit kunnu dúva uppá. Tað er ein vinna, sum kann breyðføða nógvar føroyingar, bæði á bygd og bý. Tað er ikki tað almenna, sum skal skipa fyri hesum. Tað skulu privatir operatørar sjálvandi gera. Men politikarar skulu leggja karmarnar. Politikararnir skulu syrgja fyri, at motorvegurin til Føroyar er opin, at tað ikki er ov dýrt at koma hendavegin, og politikararnir skulu eisini verða vil tið at branda Føroyar uttanlands. Og branda Føroyar sum eitt veruligt ferðamál. Og tað er júst tað, sum eitt Ferðaráð, sum tað almenna saman við privatu ferðavinnuni, átti at rikið.

Sum nú er gera myndugleikarnir beint tað øvugta. Tað verður gjørt dýrari og truplari at ferðast til Føroyar, tað syndrið, sum var eftir av Ferðaráðnum, er tveitt undir ein



landsstýrismann, sum fullkomiliga hevur skrætt tað sundur og tveitt fólkini til hús, sum skuldu røkja høvuðsmarknaðin og samskifta við útlendskar túroperatørar.

Løgmaður átti at tikið málið frá fiskimálaráðharranum og tikið sær tað sjálvur, um eingin annar í landsstýrinum er førur fyri at skapa hesi vinnuni virðiligar karmar. Um hann megnar at skapa karmarnar, so er alt at vinna og einki at tapa. Men við sera vánaligu politisku handfaringini hjá landstýrinum hjá Kaj Leo Johannesen í ferðavinnumálum, gongur bara skeiva vegin.

## Løgmaður eigur at taka ferðavinnuna í størri álvara

# Eitt langt lív saman



*Martha og Steingrim Simonsen búgva í Eldrasambýlinum*

Mynd: Karl Thomsen

## Martha og Steingrim Simonsen í Vestmanna hildu mikudagin jarnbrúdleyp

Randi Jacobsen

Tað man vera sjáldan, at hjúnum unnast at halda jarnbrúdleyp. Jarnbrúdleyp er 70 ára brúdleypsdagurin.

Mikudagin hildu Martha og Steingrim Simonsen jarnbrúdleyp.

Tey búgva bæði í Eldrasambýlinum í bygdini. Hon hevur búð har í nøkur ár, og hann flutti inn nakað seinni.

Tey eru bæði væl fyri, men treyðugt so, at ikki okkurt eldrabrekið er.

Steingrim er 90 ára gamal, og hon verður 90 í apríl.

Í sínari tíð var Steingrim sjómaður, og seinni koyrdi hann lastbil, gravimaskinu og hýrivogn.

Martha vaskaði fisk, og seinni vaksaði hon í skúlanum.

Jarnbrúdleypið gekk væl. Tey hildu tað í sambýlinum saman við børnum, svigarbørnum, ommu- og abbabørnum, langommu og –abbabørnum og onkrum oldurommu- og abbabarni.

Tað var ein stak hugnalug løta, siga skyldfólk teirra. Borðreitt varð við smurdum breyði, og sambýlið bjóðaði kransakøku.



## Steypakapping í fimleiki

BAKSÍÐAN



## Løgmaður skal sita á kassanum

TÍÐINDI Á SÍÐU 10



# Yvirformyndarí ella skilvísi...

Brúkaraumboðsmaðurin kunngjørdi í útvarpinum í gjár, at hann fer at tosa við føroysku festivalfyrireikararnar, tí teir bróta góðan marknaðarsið við at selja atgongumerki til festivalar, áðrenn kunngjørt er, hvørjir bólkar skulu spæla.

Hetta var nú ein løgin útlegging hjá brúkaraumboðsmanninum – sum kann benda á eina yvirtulking ella á yvirformyndarí. Kanska brúkaraumboðsmaðurin átti at klórað sær í nakkanum og ansað eftir, so hann ikki tekur sær ov stórt vald.

Tað er kent allastaðni, at fólk keypa atgongumerki til festivalar langt áðrenn øll nøvnini eru kunngjørt. Hesum vita fólk av, hetta eru treytirnar. Vit kunnu siga tað sama um haldaragjald av bløðum. Fólk keypa bløðini uttan at vita, hvat stendur í blaðnum, fólk rinda Kringvarpsgjald, áðrenn tey hava hoyrt og sæð, hvat Kringvarpið hevur at bjóða. Men tey kenna treytirnar. Sama er við eitt nú endaspælinum í HM finaluni í fótbólti. Fólk keypa atgongumerki – uttan yvirhøvur at vita, hvør er í endaspælinum - og enn minni í finaluni.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*